
Bloemfontain í Suðurafrika, har Tolkien búði sum barn

Framhald av síðu 47

eru teir sjey *palantírarnir*, teir fjarskoðandi steinarnir, sum Elendil og synir hansara hava við sær úr Númenor. Um *lembas*-breyðið, sum hobbarnir fáa frá álvunum og hava við sær sum ferðamat, og sum ikki slær falskar mentir, skal Tolkien hava sagt, at tað í grundini er altarbreyð.

Og so eru tað ringarnir, teir sjey, teir níggju og teir tríggir - Narja, Nelja og Vinja - sum álvarnir fáa. Mætastur av øllum er Ringurin Eini, sum valdar teimum sjey og teimum níggju.

Ringin sum ímynd finna vit eitt nú í Karlamagnusar søgu. Í norrønum skaldskapi verður greitt frá, at Loki, á ferð saman við Høniri og Óðini, er so óheppin at drepa Otur, sum er bróðir Regin og Fávnir. Teir krevja nú skaðabøtur, og Loki fer tí niður til dvørgin Andvara og noyðir hann av við ein hóp av gripum, teirra millum tann dýrabara ringin, sum Andvari í síni vreiði ger til ein óeydnisring, og sum fær navnið Andvaranaut.

Klingran av óeydnu, sum ringurin í sínum skapi ímyndar, tekur beinan vegin við og er fyrst Regini, síðani Fávni og endiliga Sjúrði at bana. Hetta er sami ringur, sum ber tónaverkið *Der Ring der Nibelungen* eftir Wagner og Ringanna Harra eftir Tolkien. Men - sum vit seinni skulu síggja - vendir Tolkien søgugongdini heilt við.

Á SLÓÐINI EFTIR GRIMM OG LÖNNROT

Men latið okkum, áðrenn vit hyggja at ringsins ferð úr Sýsluni, royna at sessa Tolkien í einum mentunarsøguligum samanhangi. Sagt verður, at tað harmaði hann nógv, at Ongland ikki, eins og mong onnur europeisk lond, átti eitt ríkidømi av forn- og miðaldarskaldskapi. Her hevði hann kanska serliga grund til at øvunda sínum egnu ættmonnum, týskarum, at teir, m.a. takkað veri søvnunum hjá brøðrunum Jacob og Wilhelm Grimm, áttu eitt ríkidømi av søgum og ævintýrum, sum vóru fólksins støði og andaligi ljómbotnur. Á sama hátt hevði Elias Lönnrot í Finnlandi í 1830-árunum burtur úr finskum hetjuskaldskapi skapt og savnað tjóðkvæðið *Kalevala*. Og, kunnu vit leggja aftrat, sama bragdið útintu Sven Grundtvig, V.U. Hammershaimb og Jakob Jakobsen í Føroyum.

Ringanna Harri er, sum Tom Shippey professari (hvørs bók *J.R.R. Tolkien. Author of the Century,* 2001, eg einamest havi styðjað meg til í hesi grein) hevur víst á, Tolkiens svar upp á avrikini hjá brøðrunum Grimm og Lönnrot. Við hesum verki, sigur Shippey, leitaði Tolkien aftur í forna tíð eftir einum ímyndaðum heimi, sum, helt hann, eina ferð veruliga hevði verið til í tjóðarinnar heildarmedviti. Samanberingin er áhugaverd, men so mugu vit leggja aftrat, at andsvarið hjá Tolkien er av serligum kreativum slag.

RINGLIÐIÐ

RINGANNA HARRI er býtt sundur í seks partar, sum vanliga verða givnir út í trimum bindum, við tveimum pørtum í hvørjum bindi. Og tað er fyrsta bind, Ringliðið, sum fevnir um tíggju kapittul og 468 síður, sum nú er komið út á føroyskum, í týðing eftir Axel Tórgarð.

Vit hava longu nevnt, at Gandálvur og Sauron hvør í sínum lagi hava fingið frænir av, at Ringurin Eini er til, og á leið hvar hann er at finna. Men Gandálvur er tann fyrri av teimum báðum, og ein fagran dag leitar hann Fróða upp í Hobbabø í Sýsluni. Um hetta mundið er Bilbo horvin, og Fróði hevur ringin. Gandálvur greiðir nú Fróða frá ringsins merkiligu søgu, og frá hvat vald er tengt at honum. Fróði er gyrdur í brøkur, tí øðrumegin er ikki ráðiligt at lata ringin frá sær, og hinumegin er Hobbabøur hóttur av vanlukku, so skjótt sum Sauron fær at vita, hvar ringurin er. Fróði vil sleppa úr hesi vandastøðu við at geva Gandálvi ringin. Men Gandálvur svarar:

*Freista meg ikki. Tí at eg vil ikki vera sum tann Myrki Harrin sjálvur. Men kortini hevur ringurin funnið veg til mítt hjarta við miskunnsemi, miskunnsemi við teimum veiku og langtan eftir styrki at gera gott. Freista meg ikki! Eg tori ikki at taka hann, enntá ikki at hava hann í varðveitslu uttan at brúka hann. Hugurin at brúka hann vildi borið av megi míni.*

Fróði veit sær nú ikki onnur ráð enn at rýma úr Sýsluni. Við í ferðini eru tænari hansara Sam Gamban og vinmenn hansara Pippingur og Káti. Teir eru fyri mongum merkiligum tilburðum, men rættilig gongd kemur ikki á søguna, fyrr enn teir kom til Klivdal. Her, í ríkinum hjá Álvrádna, hálválvinum, verður ráðstevna hildin. Millum teirra, sum taka orðið, eru dvørgurin Glóin, Álvrádni sjálvur, Gandálvur og tveir menn, sum fáa týdning seinni, Boromir úr Rohan og tann gátuføri Aragorn, róptur Stígur Flakkarin.

Tá ið ringsins søga og náttúra og tey politisku viðurskiftini í Miðgarði eru lýst úr øllum sjónarhornum, skulu tveir spurningar avgerast. Hvat skal gerast við ringin? Og hvør skal gera tað? Eftir nógv orðaskifti verður gjørt av, at ringurin skal berast aftur til Orodruin, dómadagsfjallið og blakast niður í eldrivuna, haðani hann uppruna-liga kom. Tá ið hin spurningurin - um hvør skal bera ringin hagar - kemur fyri, verður tøgn:

*Eingin talaði eitt orð. Fróði stardi at øllum andlitunum, men tey vóru ikki vend at honum. Alt ráðið sat við eygunum niðureftir, sum hugsaðu teir djúpt. Ein stórur ótti kom á hann, sum væntaði hann, at ein dómur fór at verða sagdur ... Ein ovurhonds longsul eftir at hvíla og vera í friði undir liðini á Bilbo í Klivdali fylti hjarta hansara. At enda spenti hann seg út og tók til orða, og undraðist um at hoyra síni egnu orð, sum onkur annar vilji brúkti hansara veiku rødd.*

*"Eg skal taka ringin," segði hann, "hóast eg ikki veit vegin."*

Nógv hevur verið skrivað um, í hvønn mun Ringanna Harri sipar til sína samtíð. Sjálvur hevur Tolkien hildið uppá, at hetta verk ikki skal fatast eitt nú sum ein allegori um Annan Heimsbardaga. Hóast ein kann geva honum rætt í, at tað als ikki ber til at vísa á nakað eintýtt samband millum verkið og samtíðina, ber heldur ikki til at

Framhald á síðu 50


J.R.R. Tolkien og kona hansara Edith









Faroe Cold Stores
WWW.FAROECOLDSTORES.COM
Faroe Cold Store Pf.
FO-900 Vágur
Faroe Islands
Mobile +298 21 02 81
Fax +298 37 46 11
Mobile +298 21 46 10
+298 21 69 03

- Your full range service partner in the North Atlantic




